# Sosialurin 75

Í sambandi við at Sosialurin fyllir 75 ár bjóða vit tær at tekna teg sum haldara fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum og samstundis at vera við í kappingini um hesar báðar vinningarnar:



**1. Tøm Miklagarð**
Í 10 minuttir kanst tú fylla so nógvar vørur í innkeypsvognin í Miklagarði í SMS, sum tú fært stundir til ... men bara eitt av hvørjum.

**2. Dreymaferð við nýggju Norrönu**
Vinn eina familjuferð við nýggju Norrönu hjá Smyril Line fyri 2 vaksin og 2 børn við bili




**Ja** eg tekni meg sum haldara av Sosialinum fyri 75 krónur fyri restina av ársfjórðinginum

Navn

Bústaður

Býur/bygd

Tel

e-mail

Send seðilin skjótast gjørligt til:
Sosialurin, Argjavegur 26, 160 Argir
ella faksa hann til fax nr. 314720



## Tekniskur leiðari

**Hervið verður søkt eftir tekniskum leiðara til Vestmanna Kommunu.**

**Høvuðsverkevni:**
- Hava dagligu leiðsluna av øllum tekniskum útbúnaði hjá kommununi
- Projekteringsarbeiði og eftirlit
- Uppmátingar-, kortleggingar- og skrásetingararbeiði
- Bygdar- og byggiætlanararbeiði
- Málsviðgerð og ráðlegging
- Tilrættislegging og eftirlit við kommunalum viðlíkahaldsarbeiði
- Skrivari hjá teknisku nevnd

**Førleikakrøv:**
- Verkfrøðingur, byggifrøðingur ella onnur líknandi útbúgving
- Royndir á omanfyri nevndu arbeiðsøkjum
- Royndir í projekteringsarbeiði og eftirliti
- Hollan telduførleika
- Hollar royndir í tekniforriti/-ritum

Lønin verður sambært sáttmála við avvarandi yrkisfelag.

Starvið verður at seta sum skjótast í fyribils eitt royndarár.

Bygdarráðið skilar sær rætt til frítt at velja ímillum umsøkjararnar ella ongan at velja.

Skrivlig umsókn saman við prógvum skal verða Vestmanna Kommunu í hendi í seinasta lagi 2. september 2002, kl. 16.00.

**Vestmanna Kommuna**



## Útbjóðing
**Niðurtøka av Heyganeshúsunum**

**Hervið verður arbeiðið at taka niður Heyganeshúsini á kaiøkinum í Vestmanna boðið út.**

**Arbeiðið umfatar:**
- Niðurtøku av bygningi
- Burturbeining av fundamenti
- Burturbeining av tilfari
- Bróta av veitingar til og frá bygninginum.

Skrivlig tilboð skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 26. august 2002, kl. 16.00.

Vestmanna Kommuna skilar sær rætt til at velja ímillum innkomnu tilboðini ella einki tilboð at velja.

**Vestmanna Kommuna**



## Frá Trinity Consult

Ráðgevarar okkara eru at hitta á Hotel Tórshavnar Sjómansheimi týsdagin 13. august kl. 16.00.

Greitt verður m.a. frá, hvussu ein fyritøka ella stovnur kann rekast og mennast út frá kristnu lívsvirðunum.

**Fundurin er ókeypis.**

**Trinity Consult**



## Lærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til bókhaldið.

Umsøkjarar við HH-prógvi hava fyrimun.

Umsókn við møguligum prógvum og upplýsingum um royndir annars skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 25. august 2002.

Meira fæst at vita við at venda sær til skrivstovu okkara á tlf. 345900 og tosa við Jóannes á Váli ella Ninu Djurhuus.

**P/F SMYRIL LINE**
Postboks 370
110 Tórshavn


www.sosialurin.fo



# Spennandi og undirhaldandi í Runavík

**Í einum undirhaldandi dysti har leikferðin alla tíðina var høg, vann NSÍ uppiborið á VB. Hóast nógvar málmøguleikar, serliga til heimaliðið, kom fyrsta og einasta málið ikki fyrr enn 7 minuttir vóru eftir.**

NSÍ-VB
*Bjartur Nolsøe*



*Ulrik Balling skeyt aftur mál hetta vikuskiftið, og hann hevur víst seg at vera gullverdur fyri NSÍ í ár.*
*Mynd: Savnsmynd*

Dysturin millum NSÍ og VB, hevði so góðar karmar sum ein dystur nú kann fáa. Fínasta veður og nógvir áskoðarar og lagið gott. Spurningurin var so um leikararnir dugdu at gera brúk av hesum karmum, og geva øllum teim sum spent sótu uttanfyri ein góðan dyst.

Og tað gjørdu bæði liðini til fulnar. Tí tað gjørdist ein dystur við miklari leikferð, góðum kvikum spæli og nógvum atsóknum á bæði málini.

Sum væntað legði heimaliðið trýst á VB frá byrjan. Men vágbingar komu ongantíð undir so stórt trýst, at teir ikki megnaðu at fanga NSÍ í álopi, og sjálvir seta nøkur mótálop í gongd.

Tískil gekk dysturin fyri tað mesta, at NSÍ koyrdi tey meira uppbygdu álopini, meðan vágbingar royndu seg við mótálopum. Og tað gjørdi dystin undirhaldandi.

### Nógvir málmøguleikar

Málmøguleikarnir komu eisini beinanvegin. Bæði liðini høvdu góð skot móti málinum, og Ulrik Balling slapp at royna seg longu í fimta minutti, tá hann skeyt yvir eftir eitt innlegg frá Sjúrði Jacobsen.

Men VB vildu eisini upp í part, og Nenad royndi seg úti frá, men bólturin fór yvir málinum. Eisini fekk Palli Augustinussen sneitt seg ígjøgnum NSÍ-verjuna, men skotið frá honum gjørdist ov veikt.

Sum fyrri hálvleikur leið gjørdist trýstið frá heimaliðnum størri, og hesum spurdist fleiri heilt góð tilboð burturúr.

NSÍ fekk fríspark á brotsteigarlinjuni í vinstru síðu. Brynjólvur Nielsen tók frísparkið, sum hevur kós beint móti tríkantinum, men Bjarni Johansen bjargaði í fyrstu syftu. Bólturin kom síðani út til ein NSÍ-leikara, men eisini aðru ferð bjargaði Bjarni.

Tá hálvur tími var farin hevði NSÍ hornaspark. Hetta bleiv tikið stutt til Brynjólv, sum skeyt innfyri fyrstu ferð. Bólturin kemur til Óla Hansen, sum fær sett høvdið á, men enn einaferð bjargaði Bjarni í VB-málinum. Bjarni stóð ein góðan dyst og átti hann sín stóra leiklut í, at støðan framvegis var 0-0 í hálvleikinum.

Áskoðararnir høvdu sæð ein frálíkan fyrra hálvleik, sum hóast málleysur bjóðaði uppá frálíkt undirhald við nógvum atsóknum á mál. Og spenningurin var varðveittur til seinna hálvleik.

### NSÍ trýsti

Seinni hálvleikur helt fram har fyrri endaði. Kanska hevði VB hug at leggja seg eitt sindur longur aftur, enn teir høvdu í fyrra hálvleiki. Tað gav so NSÍ møguleika at koma longri fram, og halda fast um eitt ávíst trýst.

Og heldur ikki í seinna hálvleiki trutu møguleikarnir. Tá 10 minuttir vóru farnir, løgdu runavíkingar eitt fríspark væl innfyri, har Óli Hansen púra fríur skallaði uppum.

Beint aftaná spældi Ulrik Balling Óla frian, men aftur hesuferð fór bólturin við síðuna av.

Atsóknirnar á VB-málið blivu fleri og fleiri, men runavíkingar høvdu ilt við at raka málið.

Bøði Ian Højgård og Ulrik Balling komu tætt uppá næstu løtuna, men royndirnar fóru við síðuna av.

Fyrr ella seinni mátti trýstið frá NSÍ geva úrslit, og teir fingu eisini bóltin í mál tá tað manglaðu 12 minuttir. Men Sonni L. Petersen var dømdur fyri at standa rangstaddur.

Beint eftir kundu vágbingar avgjørt dystin, tá eitt mistak í NSÍ-verjuni viðførdi, at Nenad kundi renna einsamallur móti málinum, men Jens Martin Knudsen bjargaði frálíkt.

### Aftur Balling

Tá 7 minuttir vóru eftir, kom so einasta málið í dystinum. Ein bóltur bleiv spældur inn í VB-brotsteigin. VB-verjan tóktist at hava tamarhald á støðuni, men í staðin fyri at sparka bóltin vekk drálaðu vágbingar, og so var Ulrik Balling har han skuldi verða og smekkaði bóltin inn, og harvið tryggjaði NSÍ trý stig. Ulrik var annars væl dekkaður av Slobodan Mazar, og bert fáar ferðir slapp hann at vísa sínar dygdir.

Tíðin var við at renna út fyri VB, men Palli Augustinussen fekk í yvirtíðini seinasta møguleikan í dystinum, men Jens Martin bjargaði royndini.

Dysturin endaði tí við sigri til heimaliðið, sum nú aftur liggur ovast í fyrstu deild. NSÍ var vandamiklara liðið og átti flestu møguleikarnar, men VB við sínum vælskipaða kontraspæli, átti sín lut í at dysturin gjørdist undirhaldandi.

**Dysturin í tølum:**
NSÍ-VB 1-0(0-0)
1-0: Ulrik Balling

**NSÍ:** Jens Martin Knudsen, Pól Thorsteinsson, Arnfinn Langgaard, Djóni Joensen, Sjúður Jacobsen, Brynjólvur Nielsen, Sonnie L. Petersen, Helgi L. Petersen, Eddie Mikkelsen, Óli Hansen og Ulrik Balling

**VB:** Bjarni Johansen, Slobodan Madzar, Magni Jacobsen, Eyðun Jacobsen, Michael í Lágabø, Palli Augustinussen, Marek Wierzbicki, Tórður Holm, Jóan Pauli Olsen, Robert Cislivicz og Nenad Zivanovic.




Føroya Sparikassi hevur 21 deildir kring landið. Í Føroya Sparikassa starvast 181 fólk. Á deildunum veita vit ráðgeving og selja fíggjarligar tænastur, har aðalvirðini eru tryggleiki og brúkaravinsemi. Hetta er í tráð við visión Sparikassans, sum er at vera brúkaravinarligasti peningastovnur í Føroyum. Á grannskoðanardeildini, Yviri við Strond 2, starvast 3 fólk.

## Grannskoðanarleiðari við hugsjónum

Verandi leiðari av innanhýsis grannskoðanini tekur við aðrari spennandi avbjóðing í Føroya Sparikassa. Vit søkja tí eftir eftir nýggjum grannskoðanarleiðara at byrja skjótast gjørligt.

Høvuðsuppgávan hjá innanhýsis grannskoðanini er at grannskoða ársroknskapin hjá Føroya Sparikassa, dótturfeløgum og Sparikassagrunninum. Grannskoðanin verður framd samsvarandi góðum grannskoðanarsiði og við atliti til galdandi lóggávu, reglur og viðtøkur. Grannskoðanin verður framd í samstarvi við uttanhýsisgrannskoðanina. Arbeiðið fevnir eisini um ráðgeving, eitt nú innan grannskoðan, roknskap og skatt.

Føroya Sparikassi vil skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har bæði starvsfólk og kundar trívast og mennast.

Talan er um sjálvstøðugt arbeiði, har samstarvsevni, nærlagni, effektivitetur og slagkraft eru tíðandi eginleikar. Dentur verður lagdur á, at innanhýsis grannskoðanin er virðisøkjandi í sínum arbeiði.

Umsøkjarar skulu hava eina ástøðiliga útbúgving, ið krevst fyri at gerast statsautoriseraður ella skrásettur grannskoðari. Eisini skulu umsøkjarar hava luttikið í praktiskum grannskoðanararbeiði í minsta lagi í 3 ár seinastu 5 árini.

Grannskoðanarleiðarin verður settur av nevndini í Føroya Sparikassa P/F.

Lønin verður ásett eftir avtalu.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til:

Øssur S. Nolsøe, grannskoðanarleiðari
e-mail: ossur.nolsoe@sparikassin.fo
tlf.: 348560

Umsóknarfreistin er 15. august. Umsókn við C.V. og avriti av prógvum skal sendast til:

Føroya Sparikassi P/F
Att.: Hr. Petur Zachariassen,
nevndarformaður
Postsmoga 34
110 Tórshavn

FØROYA SPARIKASSI
www.sparikassin.fo

Reproz · 319450